# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Iran er ein hóttan ímóti øllum londum og má avbyrgjast. Vit fara til verka, áðrenn tað er ov seint*
*(George W. Bush)*



## Endiliga heima

*Klokkan gott 10 í gjárkvøldið komu teir fimm menninir av farmaskipinum Danica White loksins til Danmarkar. Uttanríkisráðið hevði leigað eitt týskt flogfar, sum fleyg menninar úr Djibouti til Odense. Saman við teimum vóru umboð fyri uttanríkisráðið og nakrir sálarfrøðingar, og á flogvøllinum vóru avvarðandi komin at taka ímóti teimum fimm monnunum, sum sótu gíslar hjá somalisku sjórænarunum í 83 samdøgur. Fakfeløgini hjá monnunum fara nú at krevja, at altjóða skipaferðslan skal fáa verju har, tað er neyðugt.*

## Nú kann hon koma heimaftur

Fyrrverandi pakistanski forsætisráðharrin Benazir Bhutto kann nú venda heimaftur eftir mong ár í útlegd

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, er í trongum skóm. Alt fleiri av hansara stuðlum vilja hava hann at lata starvið sum ovasti fyri landsins heri frá sær, so hann kann virka sum forseti burturav. Higartil hevur hann tvíhildið um bæði embætini, men okkurt bendir nú á, at hann fer at heingja generalbúnan frá sær.

Í hvussu er sigur fyrrverandi pakistanski forsetin Benazir Bhutto, at Musharaf hevur boðið sær at koma heimaftur, og at tey bæði kunnu býta tað politiska valdið.

– Vit hava gjørt stór framstig í seinastuni, sigur Benazir Bhutto við The Daily Telegraph.

Politiskir eygleiðarar siga, at eitt samstarv ímillum Musharaf og Bhutto kann tryggja Musharaf afturval á forsetavalinum næsta ár, og saman eru tey bæði før fyri ay avmarka ávirkanina frá teimum víðgongdu islamistunum.



*Benazir Bhutto hevur búð í útlegd í Bretlandi í mong ár*




*SAS-flogskipararnir fylgdu ikki teirri føstu mannagongdini, og tað kundi elvt til eina stóra vanlukku*

## SAS-ferðafólk vóru í lívsvanda

**Tey 73 fólkini vóru í lívsvanda, tá flogfar teirra royndi at neyðlenda á flogvøllinum í Kalmar í Svøríki**

– Flogfarið var um at detta niður. Flogskipararnir og eftirlitsmaðurin á flogvøllinum ivaðust ikki í, at tað fór at detta niður, áðrenn tað kom niður á lendingarbreytina.

Soleiðis stendur at lesa í einari frágreiðing, sum svenska skaðanevndin almannakunngjørdi í gjár. Nevndin sigur, at í veruleikanum var tað eitt lítið tekniskt brek, sum mundi endað við einari stórari vanlukku. Niðurstøðan hjá nevndini er, at flogskipararnir fylgdu ikki teirri føstu mannagongdini, tá flogfarið fekk trupulleikar.

SAS-flogfarið var á veg úr Stockholm til Kalmar, tá ávaringartólini søgdu frá, at propellin á øðrum motorinum var ov heit. Undir slíkum umstøðum skal flogskiparin sløkkja motorin. Tað gjørdi hann ikki, men lat motorin ganga í tómgongd. Tað gjørdi, at propellin gav nógva luftmótstøðu, og at flogfarið dalaði longri og longri niður, men till alla lukku kom tað inn yvir flogvøllin, áðrenn ov seint var.

69 ferðafólk vóru við flogfarinum, og manningin taldu fýra.

### STUTT SAGT

## Kann fara til Fraklands

Ein dómari í Florida í USA gjørdi í gjár av, at fyrrverandi leiðarin í Panama Manuel Noriega kann latast fronsku myndugleikunum, sum vilja hava hann fyri rættin. Í 1992 varð Noriega dømdur í fongsul fyri rúsevnahandil, men hann møtti ikki í rættinum, og dómurin fellur burtur í næsta mánað. Tí vilja fransmenn hava fatur á honum nú, so teir kunnu ákæra hann fyri rúsevnahandil fyri minst tríggjar mió. dollarar. Verjarnir hjá Noriega hava hildið uppá, at hann hevur rættindi sum krígsfangi í USA, men tað heldur amerikanska dómsvaldið ikki.

## Sviar spara

Í Svøríki hevur stjórnin samtykt at skarva tvær mia. svenskar krónur ella 1,6 mia. krónur í okkara pengum av játtanini til verjuna tey næstu trý árini. Sambært sjónvarpinum SVT ætlar stjórnin, at verjan skal brúka minni pengar til útgerð, enn hon hevur gjørt. Sum skilst er hetta ikki tann einasta sparingin, sum fer at raka verjuna, tí sambært keldunum hjá sjónvarpinum hevur stjórnin sett ein serfrøðingabólk at kanna, hvussu verjan kann spara millum tríggjar og fýra mia. svenskar krónur afturat. Eygleiðarar í Stockholm vænta tó ikki, at tann sparingin kemur í hesum valskeiðinum.

## Stórt mannfall

Amerikanska herleiðslan í Afghanistan vil vera við, at meiri enn 100 limir í Taleban eru falnir í bardøgum við amerikanskar og afghanskar hermenn har suðuri í landinum. Sambært amerikonsku keldunum bumbaðu amerikonsk flogfør Talebanstøðir, eftir at deildir hjá Taleban høvdi søkt at amerikonsku og afghonsku hermonnunum. Tríggir amerikanskir hermenn vórðu særdir í bardøgunum, sigur herleiðslan.